


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 04 - 2013

# Johan Dahl hitta kend oljufólk í London

Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, fer í næstu viku á arbeiðsferð til London. Meðan landsstýrismaðurin er í London, skal hann á fund við Koji Sekimizu, aðalskrivara í IMO, og á fund við Malcolm Webb, forstjóra í Oil & Gas UK. Vitjað verður eisini í Westminster, har landsstýrismaðurin skal á fund við Angus MacNeil, MP, formann í Føroyanevndini í bretska parlamentinum. Eisini hittir landsstýrismaðurin Malcolm Bell, landsstýrisformann í Hetlandi, meðan hann er í London. Týsdagin 30. apríl verður skipað fyri einum átaki fyri innbodnum bretskum vinnulívsfólkum, har ið ljós verður varpað á føroyska vinnu. Landsstýrismaðurin fer at hava upplegg um vinnumøguleikar í Føroyum, og Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, og Tummas Justinussen, stjóri í Skansi Offshore, fara at kunnu um fyritøkur sínar. Mikudagin 1. mai verður skipað fyri flaggdagshaldi í móttøkuhølunum á sendistovuni, har landsstýrismaðurin fer at flyta fram røðu. Mynd Johan Dahl, oljumálaráðharri her á oljumessu í Aberdeen saman við borgarstjóranum har og Magna Arge, formanni í Føroya Oljuvinnufelag.